AGANEVNDIN

KÆRA 4/2015

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: ÍF/Víkingur kærir AB/B36 fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 1. deild kvinnur | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 14.06.2015 | Aganevndin móttikið kæru: 1. juli 2015 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

## 1. Úrskurður

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður AB/B36 1. deild kvinnur dømt at tapa dystin móti ÍF/Víkingi tann 14. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

ÍF/Víkingur hevur kært AB/B36 fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum AB/B36 og ÍF/Víkingur tann 14. juni 2015 í 1. deild hjá kvinnum.

Í kæruni vísir ÍF/Víkingur á, at AB/B36 hevur nýtt ein ólógligan leikara, av tí at Ásla Johannesen hevur leikt við AB/B36 nevnda dyst, hóast hon hevði fingið 3 gul kort, og sostatt var leikbannað til dystin móti ÍF/Víkingi.

Skrivið hjá ÍF/Víkingi hevur verið til hoyringar hjá AB/B36, sum ongar viðmerkingar hava til málið.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 14. juni 2015 varð dystur leiktur millum AB/B36 og ÍF/Víkingur í 1. deild hjá kvinnum.

Leikarin Ásla Johannesen stendur á dómaraseðlinum til dystin og leikti fyri AB/B36 í omanfyri nevnda dysti.

FSF umsitingin hevur staðfest, at leikarin Ásla Johannesen, hevði fingið 3 gul kort í landskappingini hjá 1, deild kvinnum undan hesum dystinum, og at hon tískil ikki var lógligur leikari í nevnda dyst.

**5. Lógarverkið**

**Kappingarreglur fyri Fótbólt**

§ 37a. stk. 2.

Dómarin skal skrivliga boða Kappingarnevndini frá teimum ávaringum (gult kort) ið givnar verða.

Tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann tveir (2) dagar leikbann. Hvørt gult kort givið eftir hetta, gevur leikbann í ein (1) dag.

Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi.

**6. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at omanfyri nevndi leikari hevði 3 gul kort tann 14. juni 2015, sum ikki vóru sitin yvir og tískil var ólógligur leikari í dystinum tann 14. juni 2015 millum AB/B36 og ÍF/Víkingur sbrt. § 37a stk 2 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**7. Niðurstøða**

Leikarin Ásla Johannesen leikti ólógliga í dystinum millum AB/B36 og ÍF/Víkingur í 1. deild kvinnur tann 14. juni 2015.

**8. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður AB/B36 1. deild kvinnur dømt at tapa dystin móti ÍF/Víkingur tann 14. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**AGANEVNDIN**

**Tórshavn 2. juli 2015**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna